# ES viðger Ísland

Seinni í hesum mánaðinum fer ES-nevndin at viðgera íslendsku umsóknina um limaskap í samveldinum. Verður niðurstøðan hjá nevndini jalig, verður íslendska umsóknin løgd fyri ríkis- og stjórnarleiðarafundin, sum verur í næsta mánaði. Tað kom fram á tíðindafundi í Bruxelles í gjár eftir ein fund millum íslendska forsætisráðharran Jóhonnu Sigurðardóttur, og formannin í ES-nevndini, Jose Manuel Barroso, og kommiserin Olli Rehn. Jóhanna Sigurðardóttur segði tíðindafundi, at hon var sera væl nøgd við, at ES-nevndin fer at viðgera íslendsku umsóknina longu í hesum mánaðinum.



# Meiri alifiskur rýmdi

Tøl hjá norsku myndugleikunum vísa, at meiri alifiskur slapp til rýmingar úr ringunum í fjør enn árið fyri. Fiskivinnustýrið sigur, at 170.000 laksar, 130.000 síl og 135.000 toskar rýmdu úr alistøðunum í fjør. Til samanberingar nevnir stýrið, at í 2008 sluppu 100.000 laksar til rýmingar úr ringunum. Stýrið sigur eisini, at útlitini fyri árið í ár eru ikki tey bestu, tí í síðsta mánaði sluppu 23.000 laksar úr ringunum. Stjórin í alarafelagnum, Aina Valland, sigur við NTB, at alararnir hava sett sær fyri, at eingin fiskur skal sleppa til rýmingar, og at tað er framvegis málið.

# Gerðarætturin farin langt út um

**Leiðslurnar í føroysku fakfeløgunum skúma um at Fasti Gerðarætturin er farin út um sínar heimildir við at seta tíðarfreist á fráboðanir til verkfall. – Gerðarætturin hevur strikað eina 100 ára gamla siðvenju »overnight«, sigur Magnus Tausen, formaður í Føroya Lærarafelag**

ARBEIÐSMARKNAÐUR
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*



*Í morgun hittust formenninir í teimum fimm fakfeløgunum, ið hava gjørt samstarvsavtalu. Tosað varð um ymisk mál, og meira enn so, at onkur orð fullu um Fatsa Gerðarrættin*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Tvær ferðir hesa vikuna hevur Fasti Gerðarættur, sum er settur at loysa trætur á arbeiðsmarknaðinum, sagt, at Starvsmannafelagið hevði heimild at lýsa verkfall fyri portørarnar, tí eingin sáttmáli er. Men Gerðarætturin góðtók kortini ikki verkfallið við teirri grundgeving, at fráboðanin varð givin ov stutt frammanundan.

Júst henda grundgevingin hevur loypt øði í alla fakfelagsrørsluna, sum heldur, at Gerðarætturin her er farin langt út um sínar heimildir. Eingin regla finst nakrastaðni um tíðarfreist fyri fráboðan av verkfall. Men í úrskúrðinum um lýsta arbeiðssteðginum hjá portørunum hevur Gerðarætturin skoytt uppí, at hann heldur tað verða neyðugt við tílíkum reglum í einum framkomnum samfelagi.

- Gerðarætturin hevur sagt, at verkfallið var lógligt. Og skuldi hann havt sett punktum har. Her hevur

# Úr fongsli og aftur í fongsul

**Ein 44 ára gamal maður varð í Føroya rætti hósdagin dømdur 60 daga fongsulsrevsing fyri at hava hótt fyrrverandi unnustu sína við lívinum**

FØROYA RÆTTUR
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Ein óhugnalig søga um ein mann, sum ikki hevur dugað sær hógv í fyllsskapi, var at hoyra í Føroya rætti hósdagin.

Maðurin, ein 44 ára gamal eysturoyingur, sat sum ákærdur fyri hóttanir móti fyrrverandi unnustu síni.

Maðurin varð handtikin 20. januar, eftir at hann hevði sent kvinnuni eitt hóttandi sms. Dagin eftir varð hann varðhaldsfongslaður í grundlógarhoyri.

Tað kom fram á rættarfundinum, at tey bæði áður hava verið góð, men tað hevur verið soleiðis upp og niður við tí.

8. januar kom maðurin til Føroya eftir at hava sitið ein longri dóm í Danmark. Hann fór beinanvegin at vitja ein vinmann, og haðani ringdi hann til kvinnuna. Frammanundan hevði hann sent henni fleiri sms og ringdi eisini, men hon legði ikki í at tosa við hann. Tá ið hann ringdi frá vinmanninum, spurdi hann hana í telefonini, um hon var køld, og tá ið hon svaraði nei, segði hann:

Tað kanst tú blíva, passa uppá. Eg eri eftir tær.

Dagarnar aftaná royndi hann fleiri ferðir at koma í samband við kvinnuna, og 20. januar sendi hann henni eitt sms "Og helvti (fornavnið á kvinnuni). Tú verður slaktað".

## Kvinnan bangin

Tá var kvinnan, sum búði í Havn, so bangin, at hon ringdi til politiið.

Fýra politistar fóru heim til mannin, sum sat og drakk gull saman við pápanum, og politiið koyrdi so mannin til Havnar.

Á veg suður til Havnar hevði hann brúkt fleiri ljót orð um kvinnuna, hótt við at drepa hana.

Maðurin noktaði í rættinum at hava meint tað so. Hann meinti ikki at hótta, var bara so góður við kvinnuna.

Hann segði, at tá ið hann sendi sms-ið var hann óður, tí hann hevði klæðir liggjandi heima hjá kvinnuni, og hann vildi hava hendur á klæðunum, tí hann hevði fingið kans við einum línubáti, og hevði brúk fyri klæðunum. Alt var í lagi at sleppa við bátinum. Hann hevði ikki trygdarskeið, men hann kundi sleppa við kortini. Hann hevði drukkið hetta kvøldið.

Tá ið politiið kom eftir honum, fekk hann í fyrsta umfari ikki at vita, hví hann var handtikin, men á veg suður til Havnar gekk tað upp fyri honum, og hann gjørdist óður, tí hann skuldi við línubátinum dagin eftir, og handtøkan gjørdi, at kjansurin glapp honum av hondum.

Tá var tað, at hann hevði sagt ymist ljótt um kvinnuna.

## Polititilhald

Mitt undir rættarfundinum kom ákærin við einum skjali til mannin, sum álegði honum at halda seg burtur frá kvinnuni. Hann má ikki næstu fimm árini á nakran hátt seta seg í samband við hana næstu fimm árini, Ger hann tað, kann hann fáa fongsulsrevsing í upp til tvey ár.

Hetta góðtók maðurin.